**Lýsing eftir umsóknum**

# FISKIVINNUROYNDIR **2019**

**Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum til tess at stuðla praktiskum, vinnuligum og vísindaligum royndum og kanningum, ið menna og økja um framleiðnið í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.**

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- Vinnan tekur lut í verkætlanini
- Eginfígging, onnur fígging og samfígging er skjalfest
- Samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- At verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Fiskivinnuroyndir kann í hesum umfari útluta 7,2 mió. kr. komandi ár til nýggjar og verandi verkætlanir.
Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%.(max. 300.000 kr. um árið í 3 ár).

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum. Tel. 35 30 30 / fartel. 55 32 48 ella til jakupmo@fisk.fo

**Umsóknarfreistin er mánadagin 3. desember 2018, kl. 12.00.**

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara **www.fvg.fo**

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

*Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2018.*